# TAÐ BESTA í 2010

## FØROYSK BÓK

Kári Árting:

### Marjun S. Kjelnes

*Skriva í sandin*

Ikki er lætt at velja eina bók burtur úr rúgvuni sum ársins bók millum tær um 150 nýggju føroysku bókurnar, sum komu út í 2010, tí bókurnar eru so ymiskar. Tað kundi t.d. verið ein yrkisbók ella ein søgulig bók, tí hesar fylla nógv mest í rúgvuni. Tær fylgja flestallar einum vælkendum leisti, og bróta sum so ikki burtur úr nýggjum, tó at tað ofta liggur áralangt arbeiðið við at leita eftir og skipa tilfarið aftan fyri, og fleiri av teimun eru bæði áhugaverdar og væl skrivaðar.

Í mun til hesar, kemur ikki nógvur upprunaføroyskur skaldskapur út og als ikki til ung, og tí havi eg hug at velja ungdómsbókina hjá Marjun S. Kjelnes; Skriva í sandin sum ársins føroyska útgávu.

Skriva í sandin er sum sagt ungdómsskaldsøga ella søgusavn í tíggju kapitlum. Søgugondin fylgir ikki einum tráðið, hóast øll søgan fer fram eitt vikuskifti ymsastaðni í Havn, men er skriva hegnisliga soleiðis at allar søgurnar vera flættaðar saman. Tað er ein nýggjur høvuðspersónur í hvørjari søgu, men flest allir persónarnir ganga aftur í hinum søgunum, soleiðis at høvuðspersónurin í einum kapitli er hjápersónur í tí næsta, og soleiðis vera fleiri av persónunum væl lýstir, hóast teir eru nógvir í tali. Evnini og sum Marjun tekur upp eru stór og djúp, og kunnu hvørt sær saktans fylla eina heila skaldsøgu. Hon skrivar um seksualitet og sjalusi, fráverðandi foreldur, trupulleikar millum foreldur, foreldur og tannáringarnar, rúsevnistrupuleikar, etingarólag og nógv annað, sum liggur frammalaga í hugaheiminum hjá einum tannáringi. Í so nógv yvirbroderað kann onkur kanska halda, gamaní, men av tí at søgurnar bæði kunna og tola at standa einsamallar, klárar bókin at bera hesum.




Við hesi bókini hevur ungdómurin fingið eitt framúrskarandi dokument um, hvussu tað var at vera ungur í føroyum í 2010. Eg eri vísur í at bókin verður fastur lestur á framhaldsdeildunum og miðnámsskúlunum í nógv ár framyvur, líka so væl sum foreldur kunnu lesa bókina fyri at fáa eina meiningsfulla samrøðu um bókina saman við tannáringinum.

Stórstu styrkirnar hjá Marjun er hennara evni at fáa tekstin bæði viðkomandi og nútímans eins væl at hann er lættur og flótandi.

Persónarnir eru trúligir og livandi. Eg gleði meg til Marjun hevur tilfar til eina skaldsøgu til vaksin.

## ÚTLENDSK BÓK

Kári Árting:

### Sofi Oksanen

*Renselse*

Hyggja vit út um landoddarnar er tað bókin hjá Finsku Sofi Oksanen, sum á donskum hevur fingið heiti Renselse, sum hevur bitið seg fasta.

Tað er ikki á hvørjum sinni at virðisløntar bøkur eisini fanga áhugan hjá breiða lesaraskaranum. Men bókin hjá Sofi Oksanen, sum vann Norðurlensku Bókmentavirðislønina, brýtur frá í so máta, tí bæði ummælarar og lesarar flest vera bergtiknir av hesi søguni.

Søgugongdin fyrigongur lutvíst í Estland undir sovjettisku innrásini undir seinna heimsbardaga, men eisini fyrst í nítiárunum, eftir at múrarnir eru fallnir og eitt nýtt Europa er um at taka skap. Ein dagin í 1992 finnur tann gamla Aliide eina unga illa á holdum komna gentu í túninum. Hun gerst ótrygg og bangin, men at enda vinnur samkenslan, og hon tekur gentuna inn. Soleiðis møtast Aliide og Zara.

Tann eldra hevur livað alt lív sítt á Vestur Estlenska garðinum, tann yngra vaks upp í eystur Russlandi og leitaði eftir eydnuni í vestur Europa. Hin gjørdist offur fyri sextrælahandli, men flýggjar nú undan bakmonnunum sum




elta hana. So líðandi gerast vit greið yvur hvørji bond knýta báar kvinnurnar saman, samstundis sum vit fáa søguna um eina familju sum kemur í klemmu og fer í upploysn tá nýggj leiðsla tekur valdið í einum landið.

Ikki kann sigast at skaldsøgan er reinur jólalestur. Háríni hava hug at reisa seg undir lestri, og søgan blívur við at spøkja, langt aftaná at seinasta síðan er vend.

## BILUR



Magnus Gunnarsson:

### Nissan Juke

*Persónbilur*

At velja bestu bilnýggjheit í 2010 er ikki so einfalt sum tað ljóðar. Besta nýggheit kundi jú verið tann mest praktiski bilurin, tann sum koyrir longst upp á liturin ella tann sum dálkar minst – alt eftir hvat dentur verður lagdur á.

Um vit nýta design sum mátistokk fyri bestu bilnýggjheit, eru fleiri spennandi bilar komnir til landið í 2010 sum t.d. Citroën DS3, Volvo S60, Mitsubishi ASX, Hyundai ix35 og Nissan Juke, sum er tann mest sermerkti av hesum bilum.

Flest allir nýggir bilar líkjast onkrum vit hava sæð fyrr, men Nssan Juke er ein bilur, sum veruliga skilir seg út, og fólk venda sær eftir í ferðsluni. Bilurin er eyðkendur av, at hann er høgur frá vegnum við stórum hjólum og útbygdum skermkassum.

At ein bilverksmiðja torir at koma á marknaðin við einum slíkum bili, sum sær so nógv øðrvísi út, enn tað vit eru von við, er áhugavert. Um øðrvísi og annarleiðis design er ein góð nýggjheit, er Nissan Juke eitt boð.

## LUTUR

Inna Tørnroos:

### iPad

*Peikitelda*

Í langa tíð hevði verið teskað og tutlað um, at Apple skuldi koma við onkrum slóðbrótandi innan teldur. Nógv gittu, at tað skuldi vera ein sokallað peikitelda, og rætt fingu tey. Í mars í ár kallaði Steve Jobs til tíðindafund og iPad var víst fram.

iPad er í mongum førum eitt syskinabarn hjá tí vælkendu iPhone. Sniðið er tað sama, heimknøtturin er tann sami, og á síðuni ber til at minka ella økja um ljóðið.



Grundin til, at iPad er ársins lutur, eru ikki kørnar, ið hava verið um allan heim, tá teldan er komin í handlarnar, nei, tað er hátturin sum iPad fer at ávirka internetið framyvir.

Bonnier, ið er ein av størstu blaðfyritøkum í Norðurlondum, segði fyri stuttum: »Vit taptu internet, vit tapa ikki iPad«. Við tí meina tey, at við iPad fer tað at bera til at vinna pening. Brúkararnir fáa betri vøru og tænastu, og tí verður gjørligt at taka pening fyri tað.

Aðrar vinnur, sum eisini fegnast um iPad, eru tey, sum framleiða bøkur, film, tónleikur og spøl. Øll hesi síggja iPad sum ein frálikan hátt at byrja av nýggjum við internetinum.